## Einar breyt beinið

Einar Hansen, vinstri bakkur hjá NSÍ, var so óheppin at koma illa fyri í dystinum í gjár. Seint í fyrra hálvleiki endaði hann ímillum tveir EB/Streyma-leikarar, og varð liggjandi. Løtu seinni var Einar Hansen útskiftur, og eftir dystin varð hann sendur suður á Landssjúkrahúsið. – Har staðfestu tey, at eg havi brotið eitt petti av beininum tætt við øklaknútarnar, so tað verður ein steðgur á tvær ella tríggjar vikur, visti Einar Hansen at siga í morgun. Hetta harmaði hann sjálvsagt almikið, ikki minst tí, at hann aftur varð úttikin til landsliðshópin, sum nú skal spæla venjingardyst móti Portugal. – Hetta er heilt av hundunum til, helt vinstri bakkurin fyri.



## Foldgast undir skurð

Peter Foldgast var ikki á dómaraseðlinum hjá EB/Streymi í gjár. Mong undraðust, tí hann hevur annars byrjað inni allar fimm dystirnar, síðani hann kom til EB/Streym. Orsøkin er, at Peter Foldgast er sendur til Danmarkar, har hann skal skurðviðgerast í knænum. Sum skilst er tað meniskurin, sum er trupulleikin, men við dugnaligum fólki er tað ein operatión, sum argar danan, men hetta verður nú fingið í rætt lag, soleiðis at Peter Foldgast kann tørna til aftur um tvær ella tríggjar vikur.

EB/Streymur – NSÍ 2-0 (0-0):

# Søtur sigur í Sundalagnum



*EB/Streymur hevði hepni við sær í fyrra málinum, men leikararnir eiga rós uppiborið fyri skilagott og ógvuliga taktiskt tilvitað spæl, sum kastaði trý stig av sær*

*Savnsmynd*

*EB/Streymur*

*NSÍ*

**Eftir fimm tap á rað gjørdist EB/Streymur aftur sigursharri, tá teir vunnu rímiliga sannførandi á nærmastu kappingarneytunum úr NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað leikaði annars javnt á allan fyrra hálvleik. Og skuldi tað koppa nakran vegin, so skuldi tað verið til NSÍ. Hesir máttu tvær ferðir síggja Arnbjørn Hansen rudda burtur á málstrikuni, umframt at NSÍ eisini hevði aðrar hampiligar møguleikar.

Tað hevði EB/Streymur fyri so vítt eisini, men teir komu ongantíð so nær sum NSÍ. Naskastu royndina hevði Arnbjørn Hansen, tá hann stútaði móti málinum, eftir frálíkt spæl frá Leif Niclasen og Hans Paula Samuelsen upp eftir vinstru síðu.

EB/Streymur var eisini liðið, ið kom best frá byrjan og tóktist onkursvegna at hava takið á NSÍ. Kortini vóru tað gestirnir, sum vóru tættast við at skora undan steðginum. Tað gjørdu teir bara ikki.

### Málslúkarnir gjørdu bart

Og so var tað, at EB/Streymur fór at býta frá sær. Stutt eftir steðgin sendi Hans Pauli Samuelsen eitt hart skot móti nærmara málhorni, sum Tórður Thomsen kortini megnaði at verja fyri. Hetta var ávaringarskotið.

Eitt lítið korter inn í seinna hálvleik gjørdi EB/Streymur so álvara av hóttanini. Tórður Thomsen og Johan Troest Davidsen kundu ikki heilt semjast um, hvør teirra skuldi rudda bóltin burtur. Hetta gagnnýtti Arnbjørn Hansen, slapp sær framvið teimum og legði bóltin í tóma netið. Eitt heppið mál hjá EB/Streymi, sum ongantíð átti at verið komið.

Og so gekk tað skjótt. Fimm minuttir seinni legði Arnbjørn Hansen upp til eitt mál, tá hann legði bóltin tvørtur um í brotsteiginum, har Hans Pauli Samuelsen uttan stórvegis hóvaták kundi skora. Eitt einfalt og vælspælt mál, sum Levi Hanssen byrjaði, tá hann spældi Arnbjørn Hansen leysan í høgru.

Við málunum báðum hava teir báðir bestu málskjúttarnir hjá EB/Streymi staðfest, at teir framvegis vita hvar málið stendur – og ikki minst hvussu bólturin fæst inn í tað!

### Heimaliðið hevði tamarhald

Við málunum báðum tóktist sigurin at vera í tryggum hondum. EB/Streymur hevði tamarhald á støðuni, vóru væl skipaðir og tóku ongar kjansir. Hetta gav NSÍ møguleika at skapa tað, ið eftir var av dystinum. Tað royndu Føroyameistararnir eisini, men tað gekk strilti at fáa nakað munagott burtur úr stóru leikligu yvirvágini.

Betri gekk hjá EB/Streymi, sum vóru ógvuliga kvikir í mótálopum, so skjótt hesir vunnu bóltin. Sum seinni hálvleikur leið, fall heimaliðið longur og longur aftur á vøllin. Trýstið kring brotsteigin vaks, men veruligur vandi á ferð var sjáldan. Eitt innlegg frá NSÍ rakti tvørtræið – tilvitað ella ei, men í mál fór tað ikki.

### Uppiborin sigur

Samanumtikið ein uppiborin sigur til EB/Streym. Tann annars stinna NSÍ-verjan gjørdi eitt mistak, sum varð revsað dýrt. Tann í fyrra hálvleiki so raski Karoly Potemkin svann burtur í einki í seinna hálvleiki, og tað létti um hjá EB/Streymi, samstundis sum einfalda kombinatiónsspælið, ið fyrst Øssur Dalbúð og Hjalgrim Eltør og síðani Karoly Potemkin og Hjalgrim Eltør so fínt vístu í fyrra hálvleiki, var heldur ikki at síggja í seinna.

EB/Streymur hevði hepni við sær í fyrra málinum, men leikararnir eiga rós uppiborið fyri skilagott og ógvuliga taktiskt tilvitað spæl, sum kastaði trý stig av sær. Trý ógvuliga kærkomin stig! Eitt fjórða landskappingartap hevði komið ógvuliga dátt við í Sundalagnum – hetta eisini hóastoddasessurin framvegis hevði verið varðveittur. Munurin hevði tá bara verið tvey stig. Tískil var talan um ein ógvuliga søtan sigur, sum Sundalagsmenn ognaðu sær við Margáir í gjárkvøldið.

## Júst tað vit mangladu

Egil á Bø, liðformaður hjá EB/Streymi, kundi smílandi staðfesta, at sigurin hjá EB/Streymi var kærkomin. – Hatta var akkurát tað, vit høvdu brúk fyri. Ein sigur máttu vit hava, og tað ger tað ikki verri, at mótstøðuliðið var NSÍ, segði Egil á Bø við einum skeivum brosi. Helst sipaði liðformaðurin til, at NSÍ var tað liðið, ið lá næst EB/Streymi, umframt at tað vóru runavíkingar, sum yvirhálaðu EB/Streym í fjør. Egil á Bø viðgekk, at mongu ósigrarnir helst hava ligið í bakhøvdinum á mongum leikara, men vísti hann á fyrireikingarnar seinastu tíðina, sum eftir hansara tykki hava verið ógvuliga góðar. – Tað sæst eisini í dag, tí vit eru væl skipaðir og eingin leypir framav nakrantíð, metir Egil á Bø, liðformaður hjá EB/Streymi.

## Skuffandi úrslit

Liðformaðurin hjá NSÍ, Óli Hansen, var sjónliga vónbrotin eftir dystin. – Eitt øgiliga skuffandi úrslit, staðfesti hann turrisliga eftir dystin. – Vit eru heilt einfalt ikki nóg góðir. Vit vísa ikki nóg stóran styrk, og eru ei heldur nóg sannførandi til at vinna ein dyst sum henda, ger Óli Hansen greitt. Hann fegnaðist annars um at vera komin í gongd við landskappingina aftur, eftir at hava spælt tveir altjóða dystir. – Men tað er keðiligt at byrja soleiðis, sigur liðformaðurin hjá NSÍ, sum nú sær fram til næsta dyst.